## Føroya Bjór hevur besta páskabryggið

Føroya Bjór hevur vunnið kapping millum tíggju ymisk páskabryggj, sum »Selskab for Vestjysk Ølkultur« hevur skipað fyri. Talan var um eina kapping millum tíggju ymisk sløg av páskabryggi. Føroya Bjór vann bæði fyrsta og annað plássi í felagnum sum hevur umleið 100 limir. - Vit fegnast sjálvandi um hetta, og tað er eitt stórt herðaklapp til starvsfólkini hjá Føroya Bjór, sigur Petur Petersen, leiðari á deildini hjá Føroya Bjór í Havn.



## Lívsins vatn úr Íslandi

Hetta ber við sær, at "Lívsins Vatn" frameftir verður framleitt á sprittfabrikkini á Borgarnesi í Íslandi. Orsøkin til at framleiðslan nú verður flutt til Íslands er fyrst og fremst, at íslendska sprittfabrikkin er størri og meira framkomin. Talan er um eina sprittfabrikk við nýmótans útgerð, javnari framleiðslu og einum samtaki aftanfyri við meir enn 200 starvsfólkum. - Vit hava frá byrjan havt ætlanir um at framleiða fleiri sløg av brennivíni og vaksa. At vit nú flyta framleiðsluna til Íslands gevur okkum nýggjar møguleikar og størri kapasitet. Í so máta hóskar hendan fabrikkin munandi betri til okkara tørv, siga menninir handan Dism, Mortan Mols Mortensen og Erling Eidesgaard.

# Páskahugni í Mylnuhúsi



*Konsentratión skal til tá nógvu høsnarungarnir skulu klippast út*

**PÁSKAHUGNI**
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*
*Myndir: Norðlýsið*

Páskavikuna eru stovnarnir undir Mylnuhúsinum savnaðir í Mylnuhúsinum á Mylnugøtu í Klaksvík. Børnini úr Útistovu úti í Grøv, Haraldsstovu í Haraldssundi og frítíðarskúlanum Sornhúsið, eru hesar dagarnar savnað í Mylnuhúsinum, har tey mála egg, klippa og líma høsnarungar, og pynta vakrar krukkur.

Umleið helvtin av øllum børnunum, ið hoyra til Mylnuhúsið, vóru í barnagarði tá Sosialurin kom framvið í gjár. Tá sótu tey og málaðu egg og kliptu út høsnarungar, sum tey so pyntaðu við sloyfum og eggskeljum, og í vindeyganum stóðu krukkur á rað, sum tey høvdu prýtt við páskaligum serviettum. Úr køkinum stóð lukturin av mati langan veg, og stákaðust nøkur av starvsfólkunum við at gera eina máltíð til reiðar til børnini. - Vit hava páskafrokost saman við børnunum í dag. Tað gera vit eisini til jóla á hvørjum ári. Í dag fáa tey høsnarunga, breyð, ostaborð, keks, saltstengur og ymiskt annað, greiddi Karina Joensen frá, ið starvast sum námsfrøðingur í Mylnuhúsinum. Umleið 140 børn í aldrinum 0-9 ár ganga í Mylnuhúsinum og teimum tilhoyrandi stovnunum. 30 námsfrøðingar starvast har dagliga.



*Út við 140 børn ganga dagliga í Mylnuhúsinum, teimum báðum útistovunum og frítíðarskúlanum*



*Lekkurt páskaborð við ost, keks og saltstengum*



*Vøkru eggini, sum børnini í Mylnuhúsinum hava málað, og sum tey rullaðu í túninum hjá Mylnuhúsinum*



*Børnini í Mylnuhúsinum hava seinast dagarnar klipt páskapynt, og fingu í gjár leskiligan páskafrokost í Mylnuhúsinum*